Viðmerking:

# Nakrar viðmerkingar á gáttini til ár 2000

Hendan seinasta dagin í árinum er náttúrligt at taka samanum. Í samanumtøkuni av skeiðinum hjá sitandi landsstýrissamgongu má standa ovast á breddanum, at pengarnir fossa úr landskassanum. Síðani fullveldismenninir tóku við leiðsluni í Tinganesi, eru útreiðslurnar á fíggjarlógini øktar eina slaka millión krónur hvønn einasta yrkadag!

Hetta eru sjálvsagt tøl, ið tala. Men áðrenn eg nemi við fíggjarliga óskilið í Tinganesi, ætli eg at líta eitt sindur aftur um bak. Flestu okkara munnu verða samd um at nógv er broytt hesi seinastu hundra árini, og einki er at ivast í, at broytingarnar fara at ganga skjótari í komandi øld. Eg skal bert stutt nema við fyrstu árini í hesi øldini. Tíðin í dag er so nógv ørvísi, enn tíðirnar vóru tá. Politiska skipanin, mentanin og fólkahugsanin vóru ørvísi, og tað er ein royndur lutur, at hvør tíðin skilir ikki aðra.

Tó var tað fyrst í hesi øldini, at føroyskur partapolitikkur kyknaði, og fleirflokka skipanin sá dagsins ljós. Samfelagið, sum vit síggja í dag, er framhald av teirri menning, sum grundarlag varð lagt undir tá. Tvey heimskríggj vóru í fyrru helvt av 20. øld, og hesi høvdu stóra ávirkan á føroyska gerandisdagin. Serliga tað seinna kríggið, broytti føroyska samfelagið og politisku skipanina nógv. Føroyar eftir 1948 Eftir at Føroyar og Danmark undir Seinna Heimsbardaga høvdu verið hertikin av hvør sínum stórveldi í fimm ár, dugdu øll at síggja, at ikki bar til at venda aftur til gomlu amtstøðuna. Mikið politiskt stríð var um hvørja skipan, Føroyar skuldu hava í staðin. Men endin var so, at vit fingu heimastýrislógina. Tað var undir Heimastýrisskipanini, at rættilig ferð kom á menningina av føroyska samfelagnum.

Føroyar gjørdust eitt nútímans vælferðarsamfelag, sum fylgdi menningini í okkara grannalondum.

Men føroysku loysingarflokkarnir vildu alla tíðina hava hesa skipanina burtur - uttan at hava nakað betri at seta í staðin. Sambandsflokkurin hevur tó - frá fyrsta degi - vart hesa skipan. Hon gav víðastu karmar hjá føroyska samfelagnum at fáa lut í samfelagsmenningini, og hon tryggjaði Føroya fólki bestu kor. Sambandsflokkurin í 20. øld Sambandsflokkurin hevur síðan stovnanina í 1906 haft ein tíðandi leiklut í føroyskum politikki. Frá tí at fyrsta landsstýrið varð skipað í 1948 og til dagin í dag, hevur Sambandsflokkurin verið í samgongu í umleið 31 ár - harav hevur flokkurin átt løgmann í umleið 20 ár. Sambandsflokkurin var við til at seta Heimastýrislógina í verk. Flokkurin var við til at endurnýggja fiskiskipaflotan, og at seta fólkapensiónina í verk. Hann var eisini við til at fremja samtíðarskattaskipanina og at útbyggja farmaskipaflotan. Tá búskapurin var ovurupphitaður í 80-árunum, var flokkurin við til at seta bundna uppsparing í gildi o.s.fr.

Sambandsflokkurin hevur altíð verið hornasteinurin í føroyskum politikki. Kreppan í 90-árunum Tá føroyska samfelagið fyri umleið tíggju árum síðani varð rakt av búskaparkreppu, góvu loysingarflokkarnir Heimastýrislógini skyldina fyri, at kreppan kom. Hetta gjørdu teir fyri at tváa hendur. Øll vistu, at vit í nógv ár høvdu havt bæði almenna og privata ovurnýtslu í Føroyum Vit høvdu lænt pening og vehildið, so tað forsló. (Caragata álitið s. 33) Árini frá 1994 til 1998 eydnaðist tað við Sambandsfloksins leiðslu at rudda upp og reisa samfelagið á føtur aftur undir somu stjórnarskipan, sum aðrir søgdu seg ikki kunna stýra við. Tað sigur seg sjálvt, at ein skipan, sum megnar at lyfta eitt samfelag úr djúpari búskaparkreppu og samfelagskreppu, kann ikki vera orsøkin til, at samfelagið kom í hesa somu kreppu. Broytingar eru náttúrligar Flestu lógir og skipanir mugu kortini av og á dagførast fyri at fylgja við tíðini og samfelagsmenningini. Soleiðis er eisini við Heimastýrislógini og Heimastýrisskipanini. Sambandsflokkurin hevur í farna ári tilevnað eitt nýskipanaruppskot, sum skal tryggja framhaldandi menning av føroyska samfelagnum í Ríkisfelagsskapinum.

Eftir hesum uppskoti skulu Føroyar gerast alt meira sjálvbjargnar, vælferðarsamfelagið verður varðveitt og ment, og komandi ættarlið fáa fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi. Tað einasta vissa sitandi landsstýri hevur hinvegin sett sær fyri, at Føroyar skulu gerast fullveldi.

Longu í komandi ári er ætlanin, at loysa Føroyar úr Ríkisfelagskapinum. Sostatt verður ár 2000 eitt avgerandi ár fyri framtíð Føroya. Landstýrið ætlar, at ein av bestu og tryggastu samfelagsskipanum í heiminum skal takast frá føroyingum. Helvtin av búskapinum skal hvørva, og somuleiðis skulu rættindini, sum føringar hava í ríkinum, hvørva. Hetta er tað einasta, sum við vissu kann sigast, at føroyingar fáa burtur úr ætlanum landstýrisins. Hvussu samfelagsmyndin annars fer at síggja út, er tí ikki trupult at ímynda sær.

Seinasta árið Tá vit hyggja eftir seinasta árinum, so er eitt stórt kanningararbeiði gjørt, og nógvar milliónir krónur eru brúktar í samband við fullveldisætlan landsstýrisins. Hvítabók, Caragata álitið, »Íslendsku tølini« o.s.fr. Alt hetta skuldi »hjálpa føroyingum at taka støðu til spurningin um ríkisviðurskiftini«. Men higartil má sigast, at hetta rúgvismikla og sera kostnaðarmikla tilfar, ikki hevur sannført vanliga føroyingin um tað, sum landsstýrið vildi - tvørturímóti. Mong ivast meira nú, enn tey gjørdu frammanundan, meðan onnur hava vent loysingini bakið. Tey sum enn ikki hava vent ætlani bakið, mugu helst hava meira kunning frá landsstýrinum, áðrenn tey síggja ørvitisætlanina í rætta ljósinum. Vit, sum vilja halda fram í Ríkisfelagsskapinum, fegnast um veljarakanningina, sum Útvarp Føroya gjørdi herfyri. Kanningin, sum varð almannakunngjørd beint eftir, at Hvítabók var útkomin, vísti, at 60,6% av føroysku veljarunum ynskja at verða verandi í ríkisfelagsskapinum. Veljarar eru »gummistempul« Sambært veljarakanningini hjá Útvarpinum, so halda 60,5% av teimum spurdu at spurningurin um, hvørt Føroyar skulu verða innan fyri ella uttan fyri Ríkisfelagsskapin, eigur at verða lagdur fyri veljararnar, áðrenn samráðingarnar við danir byrja. Sambandsflokkurin legði eisini í heyst eitt uppskot fyri Løgtingið um at halda eina slíka fólkaatkvøðu. Men uppskotið fall - bara Sambandsflokkurin atkvøddi fyri tí. Í veruleikanum merkir hetta, at Føroya fólk verða ikki eftirspurd, tá okkara framtíðarstøða skal avgerast. Ikki fyrr enn samráðingarnar við donsku stjórnina eru lidnar, og sáttmálin er góðtikin av bæði Løgtingi og Fólkatingi, sleppur vanligi føroyingurin at siga sína hugsan. Føroyski veljarin skal tá einans virka sum eitt »gummi-stempul«, ið skal góðtaka ein sáttmála, sum longu er avgreiddur. Ein tepur meiriluti er nøktandi, sigur landsstýrið, og fólkaatkvøðan verður ikki bindandi. Fíggjarlógin hækkar So koma vit til fíggjarliga svansið í Tinganesi, sum hevur við sær, at pengarnir í veruleikanum fossa úr landskassanum. Tað er eitt faktum, at útreiðslurnar á fíggjarlógini eru hækkaðar við meira enn 400 milliónum krónum, síðani sitandi landsstýri tók við.

Hetta svarar til einar 4 - 5 milliónir krónur um vikuna. Ella sagt við øðrum orðum: Fyri hvønn einasta yrkadag hjá hesi samgonguni eru útreiðslurnar øktar eina slaka millión krónur! Hetta eru fíggjarligu úrslitini higartil hjá einari samgongu, ið hevur sum høvuðsmál, at Føroyar skulu rekast uttan ríkisveitingar. Nú skuldu Føroyar hava eina fullveldisfíggjarlóg, søgdu teir. Vorðið sum fullveldisfíggjarlóg! Vit eru helst fleiri, sum við ljósi og lykt leita eftir trúvirðinum hjá hesi fullveldissamgonguni. Nýggja stýrisskipanarlógin Eisini á stýrisskipanarliga økinum er syndarliga lítið skil á hjá hesi samgonguni. Fleiri sera álvarslig dømi eru um hetta.

Sambært stýrisskipanarlógini, er tað løgmaður, sum hevur eftirlit við og harvið ábyrgd av, at hvør landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Tó hava vit í hesum valskeiðinum sæð, at hesar reglur verað ikki fylgdar. Løgmaður sær ímillum fingrar við landsstýrismonnum, og hetta mágar støðið undan stýrisskipanarlógini Við embætisførslu síni skapar løgmaður óhepna siðvenju, sum ger stýrisskipanina maktarleysa. Vit hava í hesum valskeiðinum sæð, at ein landsstýrismaður var baði ákærdur og dømdur uttan at verða settur frá. Vit hava í hesum valskeiðinum eisini sæð, at ein landstýrismaður ikki vildi seta lógir í gildi, sum vóru samtyktar í Løgtinginum. Og so hava vit í hesum árinum eisini verið vitni til, at landstýrismaður fór niður í landskassan eftir peningi, ið hvørki var játtaður av Løgtingi ella fíggjarnevnd. Heldur ikki hetta fekk avleiðingar! Hví landsverksfrøðingurin var frákoyrdur, er fyri mong ein gáta. Hetta kostar skattaborgarunum milliónir av krónum í starvsútreiðslum.

Men gátan verður ikki svarað, og onki fær avleiðingar. Nógv avgerandi lýti Saman um tikið er politikkinum hjá fullveldissamgonguni sera vandamikil fyri føroysku tjóðina: Ríkisrættarliga siktið er skeivt og í stríð við fólkaviljan. Veljararnir verða vanvirdir og misbrúktir í einum kvettlíknandi talvi, har leikt verður um lagnuna hjá einari heilari tjóð. Fíggjarliga stýringin er ein sonn skandala. Og ferð eftir ferð verða reglur ikki fylgdar, uttan at nakað fær avleiðingar fyri nakran. Úrslitini tala fyri seg í einari samanumtøku, sum fullveldisflokkarnir valla kunnu erpa sær av her á gáttini til ár 2000. Vit síggja inní eitt avgerandi ár fyri føroysku tjóðina. Eitt ár, sum í ringasta føri kann taka bestu møguleikar, frælsi og tryggleikan frá okkum, umframt at spjaða føroysku tjóðina.



Mítt nýggjársynski fyri lagnuárið 2000 er, at vit í Føroyum velja røttu leiðina í málinum um framtíðarstøðu Føroya, leiðina sum føroya fólk longu hevur sæð, men sum politikarar teirra ikki vilja kennast við. Á tann hátt seta vit punktum fyri langdrigna orðaskiftinum, so vit sleppa undan politiskt, og fólksligu polariseringini.

Eisini í 21. øld eiga Føroyar og føroyingar at taka lut í altjóða menningini við øktum sambandi og samstarvi — eisini við londini í ríkisfelagsskapinum.

Við ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár.

**Edmund Joensen**
**formaður**
**Sambandsfloksins**

## Eitt sindur um at siga sína hugsan

Tað er ikki lukkuligt, um tú sum føroyingur sigur tað,tú sjálvur - og øgiliga nógv onnur - hugsar. Serliga ikki, um tað hevur nakað við mentan at gera. Hygg bara at, hvussu teir ummælarar, sum tora at vera atfinningarsamir og erligir, verða viðfarnir.

Vit sóu einaferð herfyri, hvussu tað gekst Carl Johan Jensen, tá hann dittaði sær at siga, hvat hann helt um ávísar føroyskar bókaútgávur. Og nú fyri jól var Eyðun Andreasen so frekur at siga, hvat hann heldur um hesar kanningarnar, sum verða gjørdar av aldarinna einum og hvørjum.

Tað er nærliggjandi at spyrja, hvat feilar okkum føroyingum? Eru vit veruliga so býtt, at vit halda, at alt, sum verður gjørt her, er so avbera gott, at ikki ein fingur kann setast á nakað sum helst?

Er tað veruliga so, at vit ikki tora at siga, hvat vit halda um tað, sum givið verður út, tí vit eru bangin fyri, at tað fer at skaða útgevaran fíggjarliga?

Ella er vit so smásár, at vit verða formermað, bara tí onkuur dittar sær at siga, at tað, sum út verður givið á føroyskum, ikki stendur mát við tað, útgevarin sjálvur heldur?

Hetta seinasta er ivaleyst nakað nær veruleikanum. Og so er spurningurin, hvørjum vit skulu hyggja at. Tí, sum gevur út og verður fornermaður, ella tí freka og ófantaliga ummælaranum, sum ikki dugir fólkaskikk og kann lata hampafólk sleppa at geva út tað, tey hava hug til.

Harra Guð, vit hava jú frælsi til næstan hvat sum helst. Talifrælsi, skrivifrælsi og so víðari. Tó er ikki líkt til, at vit hava frælsi til at ummæla føroyskar bøkur og kanningar av aldarinnar persónur. Og tað er í grundini løgið, at fólk reagera soleiðis, sum vit hava sæð í fleiri førum. Tí hvussu bera hesi somu fólkini seg at dagliga? Tey siga akkurát tað sama, sum slí-kir dittimuntar sum Carl Johan og Eyðun eru so frekir at bera alment fram.

Munurin er bara, at hesir báðir tora at leggja navn til. Og tað er meira, enn sigast kann um tann stóra ummælaraskaran, sum gongur í krókum og skotum og ummælir bæði líkt og ólíkt. Væl kvalifiserað halda tey sjálvi.

»Men tú mást ikki siga tað aftur frá mær. Nei, nei, ert tú óður. Hvat nú um systkinabarn gummu abbadóttir handan, sum skrivaði, fær tað at vita. Vit kennast, og so verður galið, og tey fara bara at finna upp á okkurt at siga um meg. Nei fyri frið skuld er best at lata vera. Men tað er heilt sikkurt, at hatta var nakað forferdiligt lort, sum kom út til jólar. Tavavist.« Og so koma tey dulnevndu lesarabrøvini sleingjandi.

Í hesum seinna førinum, nevnt er, eru tey flestu tó so fræg, at eitt navn stendur undir. Og tað er so eitt stig rætta vegin. Men eg kann ikki lata vera við atsiga, at ikki alt, sum borið hevur verið at Eyðuni Andreasen hesar dagarnar, hevur verð líka vælumhugsað, áðrenn sent er til bløðini.

Til dømis at fara at ivast í, um vit yvirhøvur høvdu havt nakað føroyskt mál, um Victor Danielsen ikki hevði virkað, sum hann gjørdi, er helst at leggja honum í so nógvar dygdir til.

Tað verður nógv givið út til olar, og eingin, sum hugsar eitt lítið sindur, kann siga annað enn, at tað er væntaði vinningurin av søluni, sum ásetur útgávutíðina. Og tað er heilt givið, at sumt verður eisini merkt av hesum. Tí tað er eingin ivi um, at ikki alt í hesi rúgvuni er líka gott.

Men Guð náði og troysti tað ólukkudýrið, sum torir at siga tað alment.

**Edvard í Skorðini Joensen**



# ítróttur

e-mail: sveinur@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Hevur tú eina søgu ella tíðindastubba til ítróttin, ber altíð til at seta seg í samband við okkum á tlf. 311820 ella við at senda teldupost til: *jakup@sosialurin.fo*

## Broytt kyndilslið

*Talan er um bæði til- og frágongd hjá føroyameistarunum úr Kyndli, nú endaspælið í hondbólti fer av barkastokki*

Komandi vikuskifti fara bestu kvinnuliðini í landinum undir seinnu helvt av landskappingini. Størsti spenningurin man helst vera tengdur at, um klaksvíksgenturnar fara at halda fast um oddasessin, ella um nakað av hinum liðunum man megna at taka tær aftur.

Tað av hinum liðunum, sum á pappírinum hevur besta møguleikan at taka Stjørnuna aftur, er Kyndil, men kyndilsliðið verður nakað skert, nú vit fara undir seinnu helvt.

### Semona og Beinta burtur

Tað er nevnliga soleðis, at bæði Beinta Sørensen og Semona Fjallstein verða burturstaddar meginpartin av dystunum í seinnu helvt, og tískil er líkt til, at kyndilsvenjarin, Flemming Raben, verður noyddur at finna aðrar streingir at spæla upp á.

Beinta fer um fáar vikur niður til Danmarkar, har hon ætlandi skal útbúgva seg til fysioterapeut, meðan Semona fer at nýta komandi hálva árið at ferðast í.

Talan er tó ikki bara um frágongd, tí Frida Johannesen, sum fyrr hevur verið at sæð á besta kyndilsliðnum, er nú heimafturkomin, og hon hevur longu verið og vant nakrar ferðir.

Flemming Raben viðgongur eisini, at tað fer at krevja eitt sindur av umskipan, tá hópurin broytist soleiðis, men sum hann sigur, so er ikki so nógv at gera við hetta, og tær, sum eftir eru, mugu so royna at klára seg sum frægast.

Talan hevur annars verið um at fáa onkran útlendskan leikara hendan vegin, men higartil er einki komið burtur úr hesum práti, o g nú er helst somikið langt fráliðið, at einki fer at spyrjast burtur úr hesum.

Líkt er sostatt til, at tað verður eitt nakað skert kyndilslið, sum í vár fer at taka kappingina upp við Stjørnuna, men hópurin má framvegis metast sum ein hin sterkasti í landinum, so ikki er óhugsandi, at tað kann fara at gerast heilt spennandi.



*Beinta Sørensen fer í næstum av landinum í útbúgvingarørindum*

## Klaksvíkin karmur um fimta umfar



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

**Talv:** Á aðalfundi í fjør heyst hjá talvsambandinum varð avgjørt, at í fimta og tíggjunda umfari skuldi allir dystirnir í teimum trimum deildinum verða telvaðir undir sama taki. Ósaskúlin í Klaksvík verður karmur um fimta umfar nú komandi leygardag klokkan 12.00. Tíggjunda- og síðsta umfar í liðkappingini verður í Havnini síðst í februar.

Hetta tiltak sum klaksvíkingar skipa fyri leygardagin, er sera umráðandi fyri felagskapin og felagsandan í føroyskari telving, og tískil má eitt sovorðið tiltak ikki detta niðurfyri.

Liðkappingin í ár er nógv merkt av, at kollfirðingar bert manna lið í fyrstu deild. Tíðliga í kappingarárinum tóku teir sítt 3. lið úr kappingini, og mátti stutt seinni eisini taka 2. liðið úr kappingini. Teir eiga nógvir góðir telvarar sum kundu telva við, men manglandi áhugi hjá hesum monnum er helst orsøkin til hetta stóra forfall.

Eftir fýra umfør er Havnin klárt á odda í fyrstu deild, men klaksvíkingar liggja og lúra tvey og eitt hálvt stig aftanfyri. Í aðru deild eru vestmenningar eitt vet frammanfyri næstu liðini. Í triðju deild og unglingadeildini er kappingin somuleiðis hørð og opin.

## Tíðindaskriv frá Mjølnir

*Komandi vikuskifti skipar Mjølnir fyri árligu flogbóltskappingini fyri eldri deildum í Klaksvík*



45 lið hava boðað frá luttøku í ár. Hetta tal er væl lægri enn undanfarin ár. Í ár er kappingin fyrsta vikuskifti í árinum, sum er nakað fyrr enn vanligt, og er hetta møguliga ein av orsøkunum til lága luttakaratalið.

Kappingin fer annars fram í KÍ høllini og í fimleikarhallum skúlans, og verða innleiðandi dystirnir leiktir leygardagin. Sunnudagin verður so farið undir at leika finaluumførini.

Vinnandi liðini fáa steyp og heiðurstekin, og er tað P/F Kósin Seafood, sum letur hesi.

Í samband við kappingina verður skipað fyri dansi leygarkvøldið, og verður hesin hildin í Lognbrá.

## Talvið hesa vikuna

*Talvið niðanfyri varð telvað miðskeiðis í november, tá Hvalvík og Havnin møttust í liðkappingini. Frammanundan varð roknað við einum jøvnum dysti, men havnarmenn vunnu 3,5-0,5. Talvið sum er millum meg sjálvan og Martin Brekká á fyrsta borði er langt, áhugavert og ikki heilt feilfrítt.*

Hvítur : Carl Eli Nolsøe Samuelsen, rating 2040
**Svartur : Martin Brekká, rating 2100**

1.d4 Rif6
2.c4 e6
3.Rif3 d5
4.Ric3 c6
**(Byrjanin kallast frúgvabragd)**
5.cxd5 exd5
6.Bg5 Be7
7.e3 Ribd7
8.Bd3 0-0
9.0-0 Re8
10.Rb1 **(Geri meg kláran til b4_fyri síðani at leika b5)** Rif8
11.Rie5 Ri6d7!? **(Mangan havi eg telva hesa byrjan, bæði við hvítum og svørtum, men handan riddaraleikin havi eg aldin sæð fyrr)**
12.Bxe7 Fxe7
13.Rif3 **(vildi ikki býta riddaran av á d7, tí so fær hann útvikla bispin og fær samstundis rókasamband)** Rif6
14.b4 Bg4
15.Be2 Rad8
16.b5 Rie4! **(Martin fær avviklað støðuna við skili)**
17.Rixe4 dxe4
18.Rid2 Bxe2
19.Fxe2 c5
20.dxc5 Fxc5
21.Rib3 Fb6
22.Rfd1 **(Her bjóðaði eg javnleik. Eg kendi meg nøgdan við javnleik í hesari støðu, men Martin tók ikki av)** Rie6
23.Fc4 h6
24.a4 **(24.Fxe4 Fxb4 gevur svartan lítlan fyrimun)** Rig5
25.Rbc1 Fg6
26.Fc7!? **(Kongastøðan hjá mær sær veik út, men enn er hon trygg)** 26_..Rd3 **(Svartur fær einki burturúr riddaraskúkunum á f3 ella h3)**
27.Ric5 Rxd1+
28.Rxd1 b6 **(Báðir eru í tíðarneyð)**
29.Rd8? **(Orsøkin til spurnartekið sæst um fáar leikir)** Rxd8
30.Fxd8+ Kh7
31.Rib3 Fe6? **(31_.Rif3!+ 32.Kh1?? Rie1 33.g3 Fg4 og hvítur verður mátaður. 31_.Rif3+ 32.Kf1 Rixh2 33.Kg1 og svartur hevur fyrimun)**
32.Fd1 Fc4 33.Rid4 Fd5 **(Martin bjóðaði javnt, men eg sá ein seinasta møguleika og leikti víðari)**
34.Fc2 Rie6? **(34_.f5 einasti leikur)**
35.Ric6! Ric5 **(35_.Fd7 36.Fxe4+)** 36.Rixa7 Fd3? **(Frúgvaavbýtið er ikki besta loysn í tílíkum endatalvi)**
37.Fxd3 exd3
38.Kf1 Rixa4
39.Ke1 Kg6
40.Kd2 Kf6
41.Kxd3 Ke6
42.Kc4 Ric5
43.f3? Rid7? **(Her var neyðugt hjá mær at leika við tað sama 43.Ric8, soleiðis at svarta støðan læstist. Eg var heppin, tí Martin átti at leika 43_.Kd6 og tá er sera torført hjá mær at vinna)**
44.Ric8 g5 **(Martin kann ikki flyta riddara ell kong, tí antin missir hann finnu afturat ella letur hann kongin hjá mær koma inn í støðuna)**
45.Kd4 h5
46.h3 f5
47.f4 g4
48.Kc4 h4
49.Kd4 g3
50.Kc4 Rif6
51.Rixb6 Rie4
52.Rid5 Rid6+
53.Kc5 Rixb5
54.Rie7! **(Stuttlig støða, báðir riddarnir standa í deyða, og eingin kann drepast)** Ria3
55.Ric6! **(Síðsti kjansur hjá Martin er, um eg leiki 55.Rig6 Ric2 56.Rixh4 Rixe3 og javnleikur er besta boð)** Rib1
56.Rid4+ **(55_.Ric2 56.-Rid4+ riddaraavbýtið)** Kf6
57.Rif3 Ria3
58.Kd4 Rib5+
59.Kd3 **1-0**